# Svartkalvafløk fyri 180 kr./ kg.

**Vit hava ongan veruligan fiskamarknað í Føroyum, har leskiligar og feskar fiskaog skeljavørur eru at fáa. Ein tann frægasti útimarknaðurin í Føroyum til fisk – og fugl – man vera Vágsbotnur í Havn, har útróðrarmenn og veiðimenn stundum bjóða fisk og fugl til sølu**

MARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Høgir prísir á Rosdahl-marknaðinum í Ålborg*



*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Onkuntíð hevur verið sagt, at tað loysir seg ikki at hava handil við fiski í Føroyum. Kanska halda føroyingar, at fiskur er nakað, tú ikki brúkar pening upp á. Tú veiðir hann sjálvur – ella fært hann frá grannanum, onkrum í familjuni ella onkrum, ið stendur tær nær.

Kanska er nakað um hetta, men samfelagið broytist, og tað ger gerandisdagurin eisini.

## Eingin marknaður

Føroyar eru fiskivinnutjóð burtur av – ja, meira enn nøkur onnur tjóð, vit kenna. Kortini hava vit ongan veruligan fiskamarknað, har leskiligar og feskar fiska-og skeljavørur eru at fáa.

Ein tann frægasti útimarknaðurin í Føroyum til fisk – og fugl – man vera Vágsbotnur í Havn, har útróðrarmenn stundum bjóða fisk – og fugl – til sølu.

Onkur roynir seg við sølu av fiski úr vogni, sum er riggaður til endamálið.

Spyrt tú, hvussu gongur, man ivaleyst vera smáligt við sølu. Tó ikki verri enn tað, at hetta er ein avmarknaður marknaður, sum lív er í.

Samfelagið er lítið, og ein sannroynd er, at nógv onkusvegna fáa hendur á fiski. Kanska er fiski-ella útróðrarmaður í húsinum, og tá er eingin orsøk til, at nóg mikið av fiski ikki hongur á trænum ella er í boksini.

Áhugavert kundi kanska verið við einum meira skipaðum marknaði, har fólk høvdu høvi at bjóða út fisk og fugl, og har viðskiftafólk soleiðis høvdu eitt ávíst úrval at velja ímillum.

## Høgir prísir

Í fjør summar vitjaði Sosialurin ein fiska-og grønmetismarknað í Ålborg, har hópin av fiska-og skeljavørum og ymiskum fruktvørum fingust til keyps.

Hetta var sonevndi Rosdahls-marknaðurin í Ålborg.

Tað er altíð áhugavert at ganga á einum slíkum marknaði eina løtu og hyggja at vørum og prísum.

Sum myndirnar vísa, eru prísirnir á eitt nú svartkalvaflaki 180 kr/kg., toskaflaki 85 kr/ kg. og á longuflaki 78 kr./kg. Nevnast kann eisini, at prísurin á eitt nú hummarasporlum (jomfruhaler) á marknaðinum hendan dagin var heilar 200 kr./ kg.

Vit kunnu leggja aftrat, at hetta eru ikki teir prísirnir, vit kenna í Føroyum, og áhugavert hevði verið hjá teimum, sum troyta sjógvin, at fingið okkurt sum líkist hesum prísum á "borðið".

# Metúrslit hjá Sparikassanum

**Annað árið á rað setti botnlinjan hjá Føroya Sparikassa met. Úrslitið fyri 2005 gjørdist eitt avlop á 127 mió. Vanligi raksturin kastaði 164 mió kr. av sær**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Stjórin í Føroya Sparikassa er sera væl nøgdur við úrslitið, sum er hitt besta í søguni hjá Sparikassanum*

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist í 2005 ikki minni enn 164,2 mió kr., og fyrst og fremst er hetta ein staðfesting av vaksandi virkseminum. Eitt virksemi, har ein triðingur av inntøkunum nú koma frá virkisøkjum uttan fyri Føroyar.

Góða úrslitið gevur eisini teimum, sum eiga partabrøv í Sparikassanum sítt. Hóast eginpeningskontan hevur verið hampuliga stór, so var rentingin av hesi heili 18,8 prosent, sum avgjørt má metast sum nøktandi. Av hesum verður ætlaða vinningsbýti 5%

– Rentan er lág og kappingin á føroyska figgjarmarknaðinum er sera hørð.

Tí kunnu vit ikki vera annað enn nøgd við, at Sparikassin nú kemur út við enn einum metgóðum úrsliti, sigur Marner Jacobsen, forstjóri.

Í tíðindaskrivinum vísir forstjórin á, at avlopið er úrslit av einari miðvísari tilgongd seinastu árini, har Sparikassin hevur sett sær sum mál at menna virksemið í Føroyum, umframt at ein munandi partur av inntøkunum skuldi koma frá virksemi uttan fyri Føroyar. Endamálið er at økja vinningin hjá Føroya Sparikassa, spjaða váðan og gera Sparikassan upp aftur meira kappingarføran.

– Sparikassin hevur havt framgongd á fleiri økjum í Føroyum, og íløgan í Eik Bank Danmark vísir seg eisini væl aftur í úrslitinum hjá samtakinum", sigur Marner Jacobsen, forstjóri.

Úrslitið hjá Eik Bank var 41,9 mió. kr. áðrenn skatt. Seinastu árini hevur Sparikassin keypt partabrøv í størsta íslendska sparikassanum Spron og er nú størsti einstaki partaeigarin. Ognarparturin er um 10 prosent. Hartil eigur Føroya Sparikassi 42,5 prosent av DSK A/S, ið er eitt felag, sum ger íløgur í lokalar danskar peningastovnar, og sum hevur havt eitt gott ár í fjør.

Sparikassastjórin sigur at enda, at tey hava góðar vónir til gongdina í ár. Roknað verður við, at úrslitið verður oman fyri 125 mió kr. fyri skatt.

## FAKTA

### Høvuðs- og lyklatøl fyri Sparikassasamtakið

| tkr. | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Rentuinntøkur netto, og ómaksgjøld | 297.758 | 222.962 | 237.134 | 216.388 | 197.898 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra | 46.221 | 87.666 | 23.080 | 11.729 | -2.341 |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting v.m. | 180.447 | 124.660 | 121.369 | 118.161 | 106.320 |
| Avskr. og burturleggingar av skuldarum (netto) | 5.925 | 86.869 | 309.249 | 17.959 | 12.962 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 164.213 | 111.721 | -171.385 | 81.162 | 73.829 |
| Ársúrslit | 126.609 | 107.201 | -128.762 | 65.904 | 57.492 |
| **Javni** | | | | | |
| Ogn tilsamans | 8.621.030 | 6.493.565 | 5.194.770 | 5.196.398 | 4.954.253 |
| Eginpeningur ultimo | 917.330 | 826.700 | 753.596 | 882.431 | 820.497 |
| **Forrætningsgrundarlag** | | | | | |
| Útlán | 6.550.896 | 5.052.785 | 3.886.990 | 3.979.385 | 3.588.964 |
| Innlán | 4.483.030 | 4.195.076 | 3.786.192 | 3.947.217 | 3.791.944 |
| Ábyrgdir | 394.193 | 276.665 | 111.637 | 104.760 | 86.374 |
| Samlað forrætningsgrundarlag | 11.428.119 | 9.524.526 | 7.784.819 | 8.031.362 | 7.467.282 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Solvensprosent | 12,8 | 15,2 | 18,1 | 22,0 | 24,1 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 152,5 | 130,6 | 112,3 | 102,9 | 96,4 |
| Yvirdekningur í mun til lógarkrav um gjaldføri | 80,1 | 71,3 | 90,6 | 80,6 | 121,3 |
| Burturleggingarprosent | 4,0 | 7,4 | 8,3 | 2,0 | 1,8 |
| Útlán í mun til eginognina | 7,1 | 6,1 | 5,2 | 4,5 | 4,4 |
| Tal av starvsfólki, umroknað til heiltíðarstørv | 216,7 | 204,8 | 185,6 | 179,9 | 179,3 |